tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 130 Mikudagur 10. juli 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Kanningin av Landssjúkrahúsinum liðug



Mynd: Kalmar Lindenskov

Sunnudagin fekk læknastjórin sendandi frágreiðingina av kanningini, sum danska fyritøkan Dios hevur gjørt av viðurskiftunum á Landssjúkrahúsinum.

## Klaksvíkar kommuna sett nýggj fólk í starv

Seinastu tíðina eru fleiri nýggj fólk sett í starv hjá Klaksvíkar kommunu. Talan er um býráðskrivara, roknskaparleiðara, bókavørð og býarverkfrøðing

## Stjóri settur í skúlanum við Ósánna

Landsstýrið gekk ímóti innstillingini hjá Landsskúlaráðnum, og setti Símun Petur Hjelm sum stjóra. Hetta var í tráð við innstillingina hjá meirilutanum í skúlanevndini í Klaksvík

**Marjun Hanusardóttir nýggjur løgmansstjóri:**

# – Megni eg ikki uppgávuna, finni eg vegin útaftur!

**Marjun Hanusardóttir fær 43,225 kr. um mánaðin í nýggja starvinum**

# Nú fara teir at bora í Lopra




**Boritornið hjá Maersk Contractors er sett upp, og klárt er at bora**

# Nú er klárt at bora í Lopra

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er tann stóri dagur komin. Dagurin, øll hava bíðað eftir. Helst suðuroyingar. Og ikki minst fólkið í sunnari helvt í oynni, í Lopra, hava bøg og lág bíða spent eftir hesum degi. Tí hetta var dagurin, borin skuldi setast ígongd.

Nú er klárt at bora og í sambandi við „borestart í Lopra", sum danska fyritøkan, ið stendur fyri arbeiðnum, sigur, verður skipað fyri stórum tiltaki í Lopra í dag fyri innbodnum tíðindafólkum, bygdarráðslimum, myndugleikum, feløgum, fyritøkum og stovnum annars, sum hava við arbeiðið at gera.

Helst verður tað eitt vónbrot hjá nøgvum, tá ið vit nú royðast at leggja afturat, at hóast tað er klárt at bora, er mest sannlíkt, at tað fer ikki at eydnast at seta boran ígongd í dag kortini. Tí enn eru ikki allar fyrireikingar liðnar og eftir, hvat vit hava fingið fingið upplýst, er trúligt, at sjálv boringin byrjar ikki fyrrenn mitt í komandi viku.

## Gongur væl

Mesta útgerðin kom til Suðuroyar í farnu viku. Hon varð skipað upp í Vági og er síðani flutt til Lopra.

Hesa síðstu lítlu vikuna hevur verið arbeitt alt samdøgurið við at seta boran upp og at rigga útgerðina til annars.

*Tað verður arbeitt alt samdøgurið at rigga til. Arbeitt verður í tveimum vaktum, hvør vaktin er 12 tímar*

Arbeitt verður í tveimum vaktum, hvør vaktin er 12 tímar, so har er aldrin friður.

Gott 30 mans arbeiða á boriplássinum.

Allarflestu teirra eru serarbeiðarar, teir flestu úr danmark, men eisini eru nakrir úr USA, Kanada og Skottlandi, men harumframt eru nakrir føroyingar uppi. Einir fýra mans av skipasmiðjuni í Vági hava verið á oljuskeiði og teir hjálpa til við ymsumsum fyrifallandi.

Summt arbeiðsfólk gista á Bakkanum í Vági, aðrir gista í Lopra og uppaftur aðrir gista í trimum leigaðum húsum í Vági.

Bygdarhúsið í Lopra verður brúkt at eta í.

Eftir, hvat skilst, hevur arbeiðið gingið væl, eisini tann føroyski parturin.

Arni Brattaberg gjørdi stykkið bora verður á, lið ugt og handaði borifelagnum tað í góðari tíð.

Flutningurin hjá strandferðsluni hevur gingið gott og arbeiðið at seta boran upp, hevur gingið gott.

## Trygdin ílagi

Ein stórur spurningur í sambandi við boringina hevur verið trygdin. Bygdaráðið hevur ikki verið heilt nøgt við trygdartilløkini hjá Danop, serliga eftir, at norskur trygdarsertrøðingur hjá oljutyrisitinginí hevði fleiri viðmerkingar til trygdartilløkini hjá Danop.

Tað er við at koma undir land nú og trygdarsertrøðingurin er næstan nøgdur.

Men endaligt boriloyvið verður ikki givið, fyrrenn trygdin er ílagi eftir hansara tykki.

— Hann er væl nøgdur við fólkið á boriplássinum og útgerðin er í góðum standi.

— Somuleiðis er hann nøgdur við arbeiðsgongdina, sum er fyriskipað skuldi nakað hent og arbeiðsgongdina, sum heild.

Í dag skuldi fundur verða við tey lokalu bjargingarfeløgini, um, hvat tað er vert hjá teimum, at fyrireika seg uppá.

Jacob vestergaard leggur tó afturat, at tað er ógvuliga avmarkað, hvat tey kunnu gera, tí hendir nakað álvarsligt, ger tað hvørki frá ella til við teirri útgerð, sum kann útvegast í Suðuroynni.

Jacob Vestergaard sigur, at ein heilsuvandi, sum kann standast av boringini er, at gass fer at leka úr holinum.

- Talan er um sama slag gass, sum tað, ið luktar í krananum, sum stendur á plássinum.

Í ringasta føri kann so nøgv gass leka úr holinum at tað verður neyðugt at steingja vegin so eingin kemur nær boriplássinum.

Jacob Vestergaard sigur, at hetta er ikki fyri at siggja trøll á ljósum degi, men av tí at vandi er til staðar, um enn hann so mest er á pappírinum, vilja teir fegnir verða fyrireikaðir, skuldi tað borið so á, at nakað hendi.

Annars sigur Jacob Vestergaard, at tey eru ógvuliga spent uppá tað, sum nú fer at henda.

Boritornið hevur broytt bygdarmyndina fullkomiliga, men fólkið sjálvt bara arbeiðir og svevur so tað fer ikki helst ávirka gerandisdagin í Lopra nakað serligt.



*Boritornið er sett upp í Lopra og hevur broytt bygdarmyndina fullkomiliga*





Brúka okkum, tá tú brúkar teg!

*Sosialurin - 5 ferðir um vikuna*